# Ford Ka og Kia Magentis

**Í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum hesa vikuna vórðu tveir bilar ummældir: Ford Ka, sum er ein lítil hatchback við 3 hurðum, og Kia Magentis, sum er ein stórur væl útgjørdur sedan**

BILAR

Bilarnir sum vórðu ummældir í sendingini Bylgjan hjá Kringvarpinum mikudagin 14. november vóru ein Ford Ka við 1,3 bensinmotori og 70 hk og ein Kia Magentis 2,0 CRDI Exclusive við 140 hk dieselmotori.

Fyrri bilurin, sum varð royndarkoyrdur, var ein Kia Magentis 2,0 CRDI Exclusive.

Magentis er ein stórur og rúmligur sedan við fýra hurðum, sum er sera væl útgjørdur.

So gott sum alt er standard, og bilurin hevur hópin av innbygdari trygdarútgerð.

Magentis er designaður eftir evropeiskum stíli og til evropearar við t.d. stórum setrum og góðum plássi í kabinuni, bæði framman og aftan. Viðførisrúmið er næstan 500 litrar, sum er rættuliga stórt. Magentis hevur eisini góðar og tryggar koyrieginleikar.

Bilurin sum varð royndarkoyrdur hevði 2,0 CRDI dieselmotor við 140 hk, commonrail innspræning og partikulfiltri. Magentis fæst eisini við tveimum ymiskum bensinmotorum: 2,0 (4 syl.) við 144 hk, og 2,7 (V6) við 188 hk.

Kia Magentis kann síggjast og roynast hjá Berg Motors. Magentis 2,0 CRDI kostar kr. 263.800.

### Ford Ka

Seinni bilurin var Ford Ka, sum er ein lítil og lættur hatchback við trimum hurðum.

Hóast Ford Ka hevur 10 ár á baki, sær hann als ikki gamal út. Ka var ein av fyrstu Fordunum við sonevnda «New Edge» stílinum, sum hevur eyðkent Fordarnar seinastu árini. Viðførisrúmið á Ka er 186 litrar, og við baksetrunum niðri verður tað 724 litrar.

Ford Ka fæst eisini í útgávuni 1,6 Sport 95 hk við sportligum koyrieginleikum.

Ford Ka, sum er ein tann bíligasti bilurin á marknaðinum, kann síggjast og roynast hjá P/F Wenzel í Akranesgøtu. Ford Ka 1,3 kostar kr. 99.900.

Fróði Løksagarð stóð fyri sendingini, og bilaummælarar vóru Óla Jákup Rólantsson frá Vikublaðnum, og Magnus Gunnarsson frá Sosialinum.

mg







*Kia Magentis 2,0 CRDI Exclusive er ein stórur, væl útgjørdur og rúmligur sedan við 140 hk dieselmotori við turbo, commonrail innsprænin og partikulfiltri*





*Hóast Ford Ka hevur 10 ár á baki, sær hann als ikki gamal út. Ka var ein av fyrstu Fordunum við sonevnda «New Edge» stílinum*



*Opel Vectra Wagon 1,9 CDTI*

# Betri útgjørdir Vectra við størri motorum

**Opel koma nú á marknaðin við dagførdum Vectra við bæði størri motorum og meira útgerð uttan meirprís. Ein 2,0 Turbo við 175 hk kostar tað sama sum ein 2,2 við 155 hk, ella ein 150 hk diesel fyri sama prís sum ein við 120 hk dieselmotori.**

Umframt størri motorar fæst Vectra nú eisini við standardútgerð sum t.d. setrum sum deilvís eru kløðd við leðri og leðurratti.

Her hjá okkum hava Auto Service sett saman ein sonevndan »businesspakka«" við førararsetri (sum kann stillast 8 ymiskar vegir), elektroniskt klimakontroll, ferðpilot, »board-teldu«, ogel-síðurútum frammanog aftan sum standard.

Ein onnur nýggjheit er, at í 2008 hava allir Vectra við dieselmotori partikulfiltur sum standardútgerð.

Bilarnir kunnu síggjast og roynast hjá Auto Service við Oyggjarvegin. Prísirnir byrja við 265.000 krónur fyri ein 1,8 Limited við 140 hk (sedan við 4-hurðum). Sum dømi kunnu vit nevna at ein 2,2 Elegance (155 hk) við 5 hurðum og ein 2,0 Turbo Elegance (175 hk) við 5 hurðum kosta báðir 300.000 krónur. Stationcar útgávan, Vectra Wagon, er umleið 15.000 krónur dýrari enn ein sama slag í hatchback útgávuni.

mg